

# Fyrstu gassriknu ferðafólkaskipini í Danmark

**Jógvan Hugo Gardar**

30.06.2015 - 12:55

Oljan.fo

Fjord Line kemur nú at taka í nýtslu nýggja LNG-anleggið í Hirtshals. Tav eru tær bæði ferðafólkaskipini sum reivaríið brúkar milum Hirtshals og Noreg sum skulu brúka gass framyvir.

Við hesum verður gass á fyrsta sinni brúkt sum orkukelda á fervafólkaskipum í Danmark. Noreg er undangonguland tá talan er um at brúka gass til størri og minni skip.

LNG-anleggið í Hirtshals er tað fyrsta av sínum slag i Danmark, og setur tí hol á tað varni sum donsk reiðarí hava víst fyri at taka gass í nýtslu.

Orsøkin til at gass nú trýstir seg fram sum eina orkukeldu í hesi vinnuni eru nýggju krøvini frá IMO og ES um at minka um útlátið av svávul.

Sambært Fjord Line er útlátið av NOx 92 prosent lægri enn á einum vanligum skipsmotori, sum brúkar olju. samstundis minkar reiðaríið útlatið av veðurlagsgassum viv 22 prosentum.